Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 11.12.2025 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Magnus Skoralíð<br>Hanna Jensen<br>Ann Fuglø<br>Heri Mikálsson<br>Pól í Skorini<br>Unn Jarnskor Ellingsgaard<br>Tórur Didrik Djurhuus<br>Uni Rasmussen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Til viðgerð:** | | | |
| 63/25 | 25/00399-2 | Umsókn um Mentanarstuðul, Torfinnur Jákupsson. Frágreiðing og tilmæli | 2 |
| 64/25 | 25/00425-1 | Frágreiðing og tilmæli - Umbøn um eykajáttan til konto 320 - børn við serligum tørvi | 6 |
| 65/25 | 25/00501-2 | Umsókn um stuðul - Eldrafelagið fjallið. Frágreiðing og tilmæli | 8 |
| 66/25 | 25/00529-1 | Fundardagar 2026 | 10 |
| | | | |

**Til viðgerð:**

## 63/25 Umsókn um Mentanarstuðul, Torfinnur Jákupsson. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 22.09.2025 | 47/25 | 25/00399-2 |
| 2 Mentanarnevndin | 17.11.2025 | 55/25 | 25/00399-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 24.11.2025 | 40/25 | 25/00399-2 |
| 4 Mentanarnevndin | 10.12.2025 | 57/25 | 25/00399-2 |
| 5 Fíggjarnevnd | 09.12.2025 | 45/25 | 25/00399-2 |
| 6 Býráðið | 11.12.2025 | 63/25 | 25/00399-2 |

**Málslýsing:**

Sendirøðin Reyna

Reyna er ein sendirøð, ið byggir víðari á føroyska ískoytið til vælumtóktu filmssjangruna Nordic noir. Eysturkommuna og Filmsgrunnurin hava áður stuðlað menningini av røðini, og stórur áhugi er sýndur verkætlanini frá útlendskum samstarvsfeløgum - harímillum liggur nú eitt fyrsta forsølutilboð á borðinum frá Viaplay.

Við verandi framleiðslufíggjarætlan á góðar 4,5-5 mió. evrur er næsta stigið at fara undir undanframleiðsluna: harímillum at læsa pilothandritið, tryggja leikarar og leikstjóra, menna framleiðsluætlanina, og at fáa altjóða fíggingina upp á pláss. Seriubíbla eins og handrit er skrivað, sum hevur skapt stóran áhuga millum sendistøðir, stroymingtænastur, sølufeløg v.m. uttanlands, sum vit eru í samráð við. Nevnast kunnu Viaplay, BBC, ZDF og Britbox. Undirritaði er eisini úrvaldur at luttaka sum framleiðari á ACE Series Special verkstovuni hjá ACE Producers í Róm í heyst við Reyna sum case study. Hetta gagnar ikki bert hesari, men fleiri føroyskum verkætlanum í framtíðini.

Málið við verkætlanini er at byggja víðari á góðu royndirnar við fyrstu føroysku sendirøðini TROM, sum er seld um allan heim og hevur vunnið fleiri virðislønir heima sum úti í heimi. Málið er nú at taka stigið víðari við at menna og framleiða eina altjóða krimirøð, grundað í føroyskum mentanararvi og samleika, sum bæði er ein frálíkur altjóða sýnisgluggi úti í heimi og styrkir føroysku filmsvinnuna munandi her heima. Málbólkurin eru allir føroyingar eins og altjóða hyggjarar, og serliga tey, ið hava áhuga í krimirøðum frá Norðurlondum og Bretlandi. Málsetningurin við hesi umsókn er at gjøgnumføra undanframleiðsluna av Reyna skjótast gjørligt, harímillum at gera handrit liðugt, at fáa lyklaleikarar og fígging upp á pláss, so sendirøðin er klár til altjóða sølu og harvið at styrkja okkara føroysku rødd í altjóða høpi.

Umbiðin upphædd: 225.000 kr.

2024: Stuðlað í samband við satspulju til ritlist. 100.000 kr.

---

Dagføring 13.11.25

Sendirøðin "Reyna" er nú komin inn í ein sera týðandi part av menningini, harímillum fyrstu stig av undanframleiðsluni.

**Úttøkur:**
Verkætlanin varð herfyri úrvald sum ein av 18 røðum til eitt av fremstu evropeisku vinnuátøkum fyri sjálvstøðugar sjónvarpsframleiðarar, ACE Series Special í Róm. Tað er fyrstu ferð, at ein føroysk sjónvarpsverkætlan er umboðað og eitt gott tekin um altjóða útlitini fyri verkætlanina.
Luttakararnir fáa ráðgeving frá leiðandi vinnuumboðum úr Evropa og USA til víðarimenning av verkætlanunum og at tryggja dygd, altjóða fígging og samstarv.

Eg eri somuleiðis boðin við til Hollywood umvegis átakið Showrunner TV Drama Exchange, har úrvaldir skapandi framleiðarar úr Evropa verða knýttir saman við fremstu sjónvarpsframleiðarar og rásir í USA. Átakið hevur áður hýst nøkrum av mest viðurkendu nøvnunum innan norðurlendskt og altjóða drama.

Eg kann eg eisini avdúka, at "Reyna" júst er úrvald til Drama Series Pitch á Content London fyrst í desembur mánaði, ið er ein av heimsins fremstu ráðstevnum og menningarmarknaðum innan sjónvarp. At sleppa at leggja fram fyri íleggjarum og fleiri har er gullvert. At líkna við Champions League innan sjónvarp at kalla. Hesi tíðindi eru ikki almenn enn, men tað verður í næstum, og eg sendi tíðindaskriv út um tað eisini tá.

Í stuttum eru verandi tíðar- og menningarútlit fyri "Reyna" soljóðandi: Handrit og sølupakking: gongur støðugt framá og verður fullfíggjað í 2026. Undanframleiðsla: 2026. Framleiðsla: síðst í 2026 og/ella 2027.
Hetta er eftir sama skotbrá, sum flestu altjóða sjónvarpsrøðir við tilsvarandi stødd og á sama menningarstigi hava.

**Fíggjarlig útlit:**
Samlaði framleiðslukostnaðurin er áleið 4,7 mió. EUR / 35 mió. DKK fyri 6×45 minuttir. Við fyrivarni fyri, at henda fíggjarætlan kann økjast stigvíst, alt eftir ítøkiligu sáttmálatreytunum við altjóða sendistøðir/stroymingtænastur, films- og leikaralið, og so framvegis.

Fíggingaræltanin er skipað sum eitt breitt norðurlendskt og bretsk samstarv, har: Føroyar húsa minst 50% av framleiðsluni – t.e. helmingurin av upptøkum, arbeiðsmegi og útreiðslum er í/umvegis FO). Restin verður býtt millum Stóra Bretland og Norðurlond (sannlíkt Danmark og Ísland) – hetta fevnir um samframleiðslu, sølu, høvuðsrás/stroymingtænastu, tekniskar lyklapostar, eftirframleiðsla og meir.
Av hesum er verandi menningarfíggjarætlan áleið 118K EUR / 875.000 kr. ella 2,5% av samlaða framleiðslukostnaðinum – henda menningarfíggjarætlan snýr seg um at læsa handrit, films- og leikaralið, at fyrireika framleiðsluna, harímillum mannagongdir fyri burðardygga framleiðslu, at styrkja fíggjarstrukturin á verkætlanini, løgfrøði og sáttmálar, altjóða sølu og meir.
Vit hava longu fyrstu forsølutilboð á borðinum og eru í samráðingum við fleiri møguligar samstarvsfelagar í Norðurlondum, Stóra Bretlandi og Evropa.
Hesi koma í síðsta enda at veita helmingin av altjóða fíggingini til framleiðsluna sjálva.
Í Føroyum hava vit avtalu við KVF sum lokala sendistøð.

**Føroysk fígging:**
Menningarstuðul frá Filmsgrunninum (450.000 kr.)
Mentanargrunnur Landsins (40.000 kr.)
Eysturkommunu (Ritlistskipanin: 100.000 kr.)
Eginfígging (50.000 kr.).

Vit søkja nú stuðul áljóðandi 225K DKK til víðarimenning og fyrstu stig av undanframleiðslu fyri at tryggja staðbundna føroyska undirstøðukervið til verkætlanina.

Ein týðandi liður í mínum arbeiði er at uppbyggja eina meiri burðardygga filmsvinnu í Føroyum, og Eysturkommuna eigur longu ein týðandi leiklut í fyrstu og størstu filmsframleiðsluni í Føroyum higartil; TROM.

**Tilknýti til Eysturkommunu:**
Sum framleiðslustjóri á verkætlanini (og gøtumaður) kann eg hervið eisini skjóta upp, at í mun til stuðulin, ið verður veittur, so kunnu vit gera ítøkiliga avtalu um, at í minsta lagi sama upphædd, sum verkætlanin fær, eisini verður nýtt í Eysturkommunu umvegis framleiðsluna. Tað er við til at tryggja, at lokal elementir og staðbundin samstørv mynda menningina og framleiðsluna í størstan mun møguligt.
Á henda hátt hevur Eysturkommuna ein týðandi leiklut í menningini av fleiri slíkum slóðbrótandi verkætlanum – og samstundis fær kommunan stuðulin/íløgu sína aftur umvegis framleiðsluna – tað veri seg umvegis lokalt virksemi, lønir, leigu og annað viðkomandi. PR-virðið talar eisini fyri seg.

Umbiðin upphædd: 225.000 kr.

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru per d.d. 181.000 kr. tøkar.<br><br>Dagføring 13.11.25<br>Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, “Stuðul til mentan”.<br>Herav eru per d.d. 81.000 kr. tøkar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 22. september 2025**
Mentanarnevndin mælir til, at filmsverkætlanin Reyna verður stuðlað, men at ein tíðar- og fíggjarætlan eigur at vera gjørd. Møguliga byrjandi við eykajáttan í ár ella við upphædd á FÆ26. Mentanarnevndin mælir somuleiðis til, at umsitingin kannar, hvussu gongur við verkætlanini áðrenn endalig støða verður tikin.

**Mentanarnevndin 17. november 2025**
Mentanarnevndin mælir til, at umbidna upphædd verður sett av til fíggjarætlanina fyri 2026.

**Fíggjarnevnd 24. november 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at evt stuðul í 2026 til verkætlanina, verður tikin av konto 522, (Stuðul til mentan)

**Mentanarnevndin 08. desember 2025**
Mælt verður til, at 90.000 kr. verða játtaðar. 40.000 kr. verða tiknar av konto 522, stuðul til mentan, og samstundis verður mælt til, at 50.000 kr. verða tiknar av undirkonto «keyp av vørum og tænastum».

**Fíggjarnevnd 09. desember 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at veita stuðul á 40.000,00 kr og at peningurin verður tikin stuðulskonto 522

**Býráðið 11. desember 2025**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Magnus Skoralíð, Ann Fuglø, Heri Mikálsson, Unn Jarnskor Ellingsgaard, Uni Rasmussen

**Atkvøður ímóti:**
Hanna Jensen, Tórur Didrik Djurhuus, Pól í Skorini

Við tí viðmerking at mentanarnevndin heldur at verkætlanin átti at fingið 90.00,00 kr. á hesum sinni

## 64/25 Frágreiðing og tilmæli - Umbøn um eykajáttan til konto 320 - børn við serligum tørvi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 18.09.2025 | 13/25 | 25/00425-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.11.2025 | 43/25 | 25/00425-1 |
| 3 Býráðið | 27.11.2025 | 61/25 | 25/00425-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 09.12.2025 | 46/25 | 25/00425-1 |
| 5 Býráðið | 11.12.2025 | 64/25 | 25/00425-1 |

**Málslýsing:**

Á fíggjarætlanini 2025 er kr. 2.000.000 avsettar á konto 320 – *Børn við serligum tørvi.*

Til tann tørv, vit hava á dagstovna – og frítíðarøkinum, umframt Skúlaspíranum í mun til børn, sum hava serligan tørv, er tað trupult at halda okkum innanfyri verandi játtan.

Fram til ultimo august 2025 er 1.900.000 av játtanini longu brúkt og er tørvurin størri eftir summarferiuna.

Hetta ger sum sagt, at tað ikki er møguligt at halda okkum innanfyri verandi játtan, um vit skulu geva hesum børnum eitt nøktandi tilboð og er tí neyðugt við eini eykajáttan.

| | | |
|---|---|---|
| Ætlan 2025 | kr. | 2.000.000 |
| Brúkt fram ultimo august | kr. | 1.900.000 |
| Vænta forbrúk sept. okt. nov. des. 2025 | kr. | 1.400.000 |
| **Mett eykajáttan** | **kr.** | **1.300.000** |

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at eykajáttan verður gjørd á kr. 1.500.000

**Trivnaðarnevndin 18. september 2025**
Mæla til eykajáttan á kr. 1.300.000

**Fíggjarnevnd 24. november 2025**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini.

**Býráðið 27. november 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarnevndini og fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 09. desember 2025**
Fíggjarnevndin mælir til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð.

**Býráðið 11. desember 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 65/25 Umsókn um stuðul - Eldrafelagið fjallið. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 10.12.2025 | 58/25 | 25/00501-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 09.12.2025 | 47/25 | 25/00501-2 |
| 3 Býráðið | 11.12.2025 | 65/25 | 25/00501-2 |

**Málslýsing:**

**Frá umsókn:**
Stuðul verður ynsktur til rakstur av felagnum sum heild.
Sum umstøðurnar eru í dag við høgum prísvøkstri á vørum og øðrum, meta vit hesa upphædd vera passandi.

Tað sum felagið arbeiðir fyri er at hava sosialar samankomstir fyri eldri so sum, hugnaløtir, bingo, veitslur og onnur tiltøk.

**Frá telefonsamrøðu við umboð fyri eldrafelagið:**
Felagið hevur einki stórt virksemi havt í ár, men tey eldru hava tó verið samlað til hugnaløtur, eisini nú á jólum. Tá ið tey møtast, er hetta í bygdarhúsinum, har vanlig leiga verður goldin. Afturat hesum er regluliga bingo. Tey ynskja tó at kunna fara útferðir av og á, men peningur hevur ikki verið til tess í ár.

Fíggjarliga:
Okkurt yvirskot var frá í fjør, annars gevur bingo eitt sindur og so stuðulin frá kommununi.
Eingin stuðul aðra staðni frá.
Seinasta umsókn frá felagnum var á vári 2023. Samtykt upphædd: 40.000 kr.

Umbiðin upphædd: 50.000 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Á fíggjarætlanini fyri 2025 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan".
Herav eru per d.d. 62.000 kr. tøkar.

**Tilmæli**

Mælt verður til at ganga umsókn á møti

### Mentanarnevndin 10. desember 2025
Mentanarnevndin mælir til at umsøkjarin fær 50.000 kr., sambært umsókn.

### Fíggjarnevnd 09. desember 2025
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 11. desember 2025**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 66/25 Fundardagar 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðið | 11.12.2025 | 66/25 | 25/00529-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi uppskot til fundardagar fyri 2026 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Býráðið 11. desember 2025**
Einmælt samtykt

fundurin lokin kl. 21.00

Per Martin Gregersen

Magnus Skoralíð

Hanna Jensen

Ann Fuglø

Heri Mikálsson

Pól í Skorini

Unn Jarnskor
Ellingsgaard

Tórur Didrik Djurhuus

Uni Rasmussen